# Mýtan um danskt í miðnámsskúlunum

DÁVID ISFELD
Hósvík



Í februar var kjak um danskt í HF- og studentaskúlunum, og var dentur lagdur á frá fleiri persónum um at hava danskt á hesum skúlum, tí at tað var alneyðugt, um næmingarnir í hesum skúlum høvdu ætlanir um hægri lesnað - sjálvsagt sipandi til lesnað í Danmark.

Fyrst av øllum vil eg siga, at tað er eingin orsøk til at skúla okkara miðnámsskúlanæmingar til at fara á donsk universitet ella aðrar hægri læristovnar í Danmark. Vit skulu skúla okkara næmingar til at kunna fara á hægri læristovnar í Føroyum og í útlondum, uttan serstakt atlit til Danmark - kann ein koma inn í altjóða lærustovnar, kann ein eisini koma inn í danskar lærustovnar.

Tað hevur undrað meg at hoyrt fólk siga, at tað er neyðugt at duga væl danskt, um ein ætlar sær at lesa víðari í Danmark. Hetta passar ikki heilt. Tað kann vera, at tað er ein fyrimunur í nøkrum útbúgvingum, men langt frá øllum. Nú havi eg sjálvur lisið á "Københavns universitet", havi ein bróður, sum hevur lisið søgu og átrúnað har, eisini havi eg vinir, ið hava lisið har og á "Teologiske institut", so eg havi sæð lærubøkurnar, ið verða nýttar til undirvísingina í nógvum lærugreinum. T.d. kunnu nevnast: alisfrøði, søga, heimspeki, mannfrøði, gudfrøði, sálarfrøði og samfelagsfrøði. Í hesum lærugreinum er stórur partur, og í nøkrum førum meginparturin, av undirvísingartilfarinum á enskum. Føroyingar duga heilt væl danskt, tá ið teir koma út úr fólkaskúlanum, so tað er burturspilt tíð, orka og pengar, at leggja dent á danskt í miðnámsskúlunum.

**Danskt á A-støði**

Vit hava m.a. hoyrt, at ætlanin er, at HF- og studentaskúlanæmingar skulu hava A-støði í donskum. Á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum undir "Endurskoðan av gymnasialu útbúgvingunum" stendur: "Upptøkukrøvini til hægri útbúgvingar í Danmark verða frá 2008 herd soleiðis, at allir næmingar í minsta lagi skulu hava danskt A og enskt B."

Undir somu yvirskrift "Krøvini frá hægri lærustovnum" stendur eitt sindur longur niðri: "Norðurlendska samstarvið skal framhaldandi verða raðfest høgt, men strembað eigur at verða eftir, at Føroyar skjótast til ber verða partur av rammuætlanunum hjá ES innan útbúgving." So stendur ein spurin; hvussu sær ein rammuætlan hjá ES út? Eitt kvalifisera git er, at danskt ikki er uppi í tí rammuætlanini fyri lond uttan fyri Danmark. Ber tað ikki til at gera eina skilagóða langtíðarætlan viðvíkjandi undirvísingarskipanini í Føroyum? Um ES skal upp í leikin síggi eg als onga orsøk til at fjeppast uppi í Danmark ella donskum. Hetta líkist mest eina politiska tilætlaðari einsrættan av okkara vali, um hvar vit fara at lesa. Hví vilja okkara politikarar hava okkum at velja Danmark framum onnur lond at nema okkum hægri lesnað – tað er jú tað, okkara mentamálaráðharri arbeiðir fram ímóti.

Áhugavert var at síggja hetta brot í somu leinkju:

Bertel Haarder, úr framløguni á ráðstevnuni 17. februar í 2006
*"Det talte ord gælder" (red.)*
*"Her vil jeg gerne understrege, at jeg ikke vil pege på en bestemt løsning for den model, I beslutter jer for på Færøerne. Færøske elevers studiekompetence i Danmark er ikke betinget af, at jeres uddannelsesstruktur er et spejl af den danske model."* (eg havi sjálvur sett undirstriku)

**Norðurlendingar á donsk universitet**

Íslendingar, noregsmenn og sviar hava ikki ein tvungnan tíma av donskum í fólkaskúlanum ella í miðnámsskúlanum. Hví skulu vit, sum hava havt danskt í 8 ár í fólkaskúlanum, hava tvungið danskt í miðnámsskúlanum eisini. Hetta kostar nógvar pengar, eins og tað krevur tíð hjá lærarum og krevur høli til hesa undirvísing, hvørs tíð og høli annars kundi verið nýtt til okkurt meira týdningarmikið, ið gevur persónligar ella altjóða relevantar førleikar. Av tí at danskt er á rættiliga høgum støði á miðnámsskúlanum, er tað eisini sera lesitungt og tíðarkrevjandi fyri næmingarnar; tískil var nógv betur, um vit nýttu hesa lesnaðar orku og tilfeingi øðrvísi og meira relevant.

Hví ikki avmarka danskt til eina vallærugrein í miðnámsskúlanum? So fáa tey, ið vilja hava danskt, alla ta undirvísing teimum tørva, uttan at lasta teir næmingar, ið ikki hava tørv á donskum. Vit skulu skúla okkara miðnámsskúlanæmingar til hægri lesnað generelt; og ikki bert við atlitið til hægri danskar lærustovnar.

Læknin sigur: et fjøltáttaðan mat, tí at tað er tað sunnasta. Sum eina analogi til hetta, vil eg siga: Nemið tykkum vitan og útbúgving í fjøltáttaðum tjóðum, tí tað er tað sunnasta fyri samfelagið. Flest fólk eru samd um, at fjøltáttaðar royndir og breið vitan er góð...er tað neyðugt at siga meira?

# Ræstar greipur og fokus á nøkur bílig skoraði stig

JÁKUP Á STONGUM



Sum fyrsta felag nakrantíð (?) megnaði Sørvágs Ítróttarfelag at vinna dupulta greipu, sambart vanligum reglum. Í februar vann SÍ báðar steypafinalurnar og við sigrinum sunnudagin, kvinnurnar á KÍF og mennirnir á Mjølnir, endaðu bæði SÍ-liðini á ovastu rók í FM-kappingini.

Men reglurnar eru broyttar. Broyttar soleiðis at nummar tvey fær nøkur bílig -ókeypis- stig upp á javnt við oddaliðið, og so skulu finalur leikast. Ikki ein, ikki tvær, men heilar tríggjar í tali. Spurningurin er so um hesar finalur, har nummar tvey hevur alt at vinna og nummar eitt hevur alt at tapa, tænir føroyskum flogbólti.

Øll vita, at tað sum hevur ment og sett Sørvágs Ítróttarfelag á ovastu rók í føroyskum flogbólti, er eitt megnar ungdómseirbeiði yvir áratíggir. Fokus er sett á góðar venjarar. Foreldur, felag og viðhaldsfólk ríða í dag á eini sólskinssøgu har allur heiður fellur nærumhvørvinum í lut.

Ikki eitt stig er fingið ókeypis. Tær løturnar fokus var á, tá liðið baksaðist aftast, var tá ið vit bjóðaðu teim stóru av. Tá varð onkur løtan, fjølmiðlaheimurin fekk eyga á okkum, og vit komu í sjónvarpið.

Hvørjum tæna tær broyttu viðtøkurnar. Tæna tær teimum sum baksast við at byggja upp? Gevur tað nakra sum helst meining at fáa fjølmiðlarnar, at seta enn meiri fokus á einasta fokus teir hava frammanundan. Tænir tað nøkrum endamáli at mergsúgva trúgvastu viðhaldsfólkini fyri seinasta dropan í trimum finalum, sum framhaldandi bara hava fokus á teimum bestu?

Eitt talandi dømi er dysturin nú sunnudagin, okkara kvinnur vóru og vitjaðu KÍF. Hetta skuldi verið dysturin tá tær úr KÍF vóru settar eitt lítið sindur í fokus. Settar í fokus tí tær tóku ímóti meistarunum triðja árið á rað. Kanska sett fokus á teirra trupla veg í bestu deildina. Fokus á mistar leikarar, og nøkur onnur bílig stig, givin til eitt annað felag sum ikki sjálvt megnaði vegin í bestu deildina. Men heldur ikki hendan dagin var fokus á unga KÍF-liðnum.

Sama kann sigast um mjølnirdystin hjá monnum. Her kundi Mjølnir havt bygt seg upp til endabrak á heimavølli. Men onki sús. Bíða, bíða! Vit fara til Eiðis komandi tríggjar vikurnar! Tá mugu tit øll koma og stuðla okkum.

Flogbóltssambandið hevur gjørt eitt megnararbeiði við steypafinalunum. Flogbólturin í fokus frá síni bestu síðu, har liðið við besta dagsforminum vinnur. Men! Í hesum døgum skal fokus ikki vera á tveyarar og dagsform, men á tí liði og felagi, ella á øllum teimum, sum royndust best samanlagt gjøgnum árið, ikki minst á teim yngru deildunum. Spennandi verður eisini at fylgja monnunum hjá TB og nýggju eysturoyarliðunum.

Summa summarum má verða, at ókeypis fingin, ella givin stig, er stokkutur fløvi fyri føroyskan flogbólt. Sum at pissa í løgvan.

Einasta felag sum kan vinna FM-heitið, anno 2010, í báðum teimum bestu flogbóltsdeildunum, uttan nøkur ókeypis stig, er Sørvágs Ítróttarfelag! Livst so spyrst!

# Privatisera tunnil við bindi fyri eyguni

BJØRT SAMUELSEN
løgtingskvinna



Tjóðveldi tekur undir við Skálafjarðatunlinum, men ikki við eini løg, sum bindur landið niður og hevur ógvusliga slagsíðu til fyrimuns fyri eitt útvalt privat felag.

Alfred Olsen endurgevur undirritaðu fyri at hava sagt: "Vit koma ikki at atkvøða fyri lógaruppskotinum um Skálafjarðatunnilin". Hatta vóru ikki míni orð, tí talan er ikki um eitt uppskot um at gera Skálafjarðatunnil, men eitt uppskot um at geva einum privatum felag einkarætt til at gera og reka tunnilin og harvið eisini at fáa inntøkurnar frá bummgjaldinum, sum væntandi verða omanfyri 100 milliónir krónur árliga.

Tí vísti eg í Eygsjón 10. mars á, at vit ikki vita, hvat vit samtykkja við lógaruppskotinum, sum nú liggur á borðinum, tí vit kenna als ikki treytirnar í avtaluni sum landsstýrið ætlar at gera við P/F Skálafjarðatunnilin.

**Fíggjarligi partur manglar**

Íløgan er stór, um eina milliard, men inntøkur væl omanfyri 100 milliónir árliga í 25-30 ár eru eisini øðiligir pengar. Hvussu stórur beinleiðis vinningurin hjá teimum privatu verður, vita vit ikki, tí fíggjarligi parturin av verkætlanini fyriliggur ikki. Tað stendur í viðmerkingunum, at vinningurin verður settur í mun til tann váða, felagið átekur sær. Hvussu stórur váðin verður mettur at vera, verður einki sagt um.

Landsstýrisfólkið fekk heimild at samráðast við hetta partafelagið við løgtingssamtykt longu í 2007. Lógin skal áseta treytirnar fyri avtaluni. Men vandin við lógaruppskotinum sum nú er komið er, at tað bindur landið niður og til ein váða, sum vit ikki kenna víðførið av. Løgtingið má sostatt gita sær til avleiðingarnar, so leingi vit ikki kenna fíggjarliga partin og ikki hava hóming av, hvat kemur at standa í sjálvari avtaluni.

**Privatisera í blindum**

Sagt verður, at landið kann fara inn og yvirtaka verkætlanina. Men, hetta skal vera sambært teimum treytum, sum verða ásettar í avtaluni. Altso vita vit ikki hvat henda áseting er verd, fyrr enn avtalan við felagið er undirskrivað.

Og hví skal landið til dømis binda seg til at gjalda partafelagnum endurgjald fyri aðrar útbyggingar, sum gjørdar verða á veganetið? Og hvussu stórt verður endurgjaldið, um landið yvirtekur tunnilin, orsakað av at felagið misheldur sínar skyldur? Hetta eru nøkur av nógvu ivamálum, sum skulu ásetast í sjálvari avtaluni, sum eftir øllum at døma ikki verður liðug fyrr enn í november ella seinni.

Mín egna sannføring er framvegis, at landið eigur at byggja tunnilin, og gjalda partafelagnum fyri gjørt tilfar, sum landið kann brúka í verkætlanini. Hetta er ikki ein tung uppgáva hjá landinum, tí sum so ofta hevur verið frammi ber íløgan seg sera væl fíggjarliga.

Men um ABC-flokkarnir veruliga eru so heitir fyri er privatu loysnini, so má tað í øllum føri verða gjørt soleiðis, at landið verður hildið skaðaleyst. Tað verður tað ikki sambært uppskotinum, sum nú liggur á borðinum.

Løgtingið eigur ikki við bindi fyri eyguni at privatisera okkara infrakervi.